Terje B. Vestergaard **Nr. 20/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um Fjøruvegin í Runavík og trupulleikar við ferðslu, tá Skálafjarðar-tunnilin letur upp fyri almennari ferðslu, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja málið: løgtingsmál nr. 142/2018: Uppskot til løgtingslóg um nýggjan Fjøruveg í Runavík, fram á ting av nýggjum?
2. Um ikki, hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa avbjóðingina við innkomuvegnum í Runavík?
3. Hvussu nógvan pening ætlar landsstýrismaðurin at seta av til verkætlanina á fíggjarlógini 2020 og tey næstu árini?
4. Hvat metir landsstýrismaðurin, at samlaði kostnaðurin verður fyri landskassan av samlaðu verkætlanini?
5. Ætlar landsstýrismaðurin at javnseta komunurnar báðu megin tunnilsmunnarnar viðvíkjandi almenna partinum?
6. Nær kann hugsast, at arbeiðið byrjar?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í samferðslumálum í undanfarnu samgongu dagfestir og undirskrivar uppskotið, løgtingsmál nr. 142/2018: Uppskot til løgtingslóg um nýggjan Fjøruveg í Runavík, tann 28. februar 2019, og leggur málið fyri tingið.

Uppskotið varð viðgjørt á tingfundi hósdagin 14. mars 2019. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, og fall tí burtur.

Um talan er um tilætlað drál er ikki til at vita, men á heimasíðuni hjá Løgtinginum stendur: *"Málið fall burtur sambært stýrisskipanarlógini § 15, stk. 3, tí málið ikki var liðugt viðgjørt, tá tingsetan endaði".* Málið er blivið viðgjørt saman við avvarðandi pørtum á fíggjarnevndar-fundum hósdagin 21. mars, og týsdagin 9. apríl.

Allir partar eru væl og virðiliga kunnaðir um, at málið hevur serstakan skund.

Ferðslan í Runavík og har um leiðir er nógv vaksin seinastu árini. Í 2020 letur Eysturoyartunnlin upp fyri ferðslu, sum merkir, at Runavík verður ein av høvuðsfarleiðum landsins.

Um ruðuleiki ikki skal valda í ferðsluni frá Skálafjarðartunlinum er neyðugt, at arbeiðið upp á vegagerðina byrjar alt fyri eitt.

Hetta er orsøkin til omanfyri standandi fyrispurningar.

Á Løgtingi, 14. november 2019

Terje B. Vestergaard